# *Grøðiskel*

Várið 1923 legði hópur av *ryggjaskeljum av høgguslokki* (Sepia officinalis) upp ymsar staðir í Føroyum (Spärck 12). Tað kom knappliga og helt eins brádliga uppat. Hesin høgguslokkurin livir annars ikki undir Føroyum, men hann er vanliga við strendur Suðuronglands og Fraklands.



Grøðiskel av høgguslokki, Sepia officinalis.

Müller sýslumaður (Spärck 12) sigur, at høgguslokkaskeljar, nevndar *grøðiskeljar,* vóru nýttar í Føroyum til sár. Hetta bendir avgjørt á, at tílíkar skeljar eisini fyrr munnu hava rikið upp á land her, — og ivaleyst man so vera. Ein maður í L, borin í heim i 1845, greiddi í 1923 fra, at hann mintist, tá ið hann var 6—8 ára gamal, at mamma hansara goymdi tílíka skel, og hann mintist orðið grøðiskel. Hevði onkur í húsinum sár, varð tjúkkari endin av skelini brankaður yvir eldinum, og eitt sindur av hesum brúna og turra varð skavað fint sum dust beint niður í sárið. Maðurin, sum i 1923 greiddi frá hesum, hevði onga tíð seinni sæð, hoyrt um ella funnið tílíka skel; men hann kendi hana beinanvegin, tá ið hann hetta árið sá hana aftur.

Kelda: Gomul Føroysk Heimaráð, 1959
Rithøvundur: Rasmus Kristen Rasmussen
Týtt hevur: Jóhannis Av Skarði